Tórshavnar alfrøði:

# Løgtingshúsini í 1854 og 1907



*Gamla tinghúsið varð bygt í 1854*



*Eftir eina um- og útbygging stóð nýggja løgtingshúsið liðugt í 1907 . Leggið til merkis, at tey fýra vindeyguni í miðjuni á húsinum eru tey somu sum á gamla bygninginum*

***Teir fimm havnarmennirnir sum stóðu fyri arbeiðinum:***













Eftir at gamla Tinghúsið (bygt 1854) var vorðið ov lítið, varð í 1906 avgjørt at byggja nýtt Tinghús. Um jóltíðir sama árið, var farið undir um- og útbyggingina, húsið varð longt bæði oman eftir og niðan eftir, kostnaðurin var kr. 5.800.

„Nýggja“ Tinghúsið bleiv tikið í brúk 1. juli 1907. Teir 5 havnarmennirnir sum stóðu fyri arbeiðinum vóru: Dione og Poul Isaksen „í Geil“, teir høvdu málara- og tapetiseringsarbeiðið um hendi, timburarbeiðið gjørdi Hans Andr. Hansen „Dia í Pæsastovu“, og grundina gjørdu Kristian August Mouritsen „Kristian í Barnastovu“ og Johannes F. Simonsen „Johannes murer“.

Havnarfólk vóru ikki errin av nýggja Tinghúsinum, sum tey als ikki hildu passaði við umhvørvið. 11 ár frammanundan, í 1896, varð nýggi kommunuskúlin tikin í brúk, skúlin kostaði 38 tús. kr. og var hetta ein stór byrða hjá teimum fáðu skattgjaldarunum, sum búðu í Havn tá (íbúgvaratalið í Havn var í 1890, 1303 fólk).

Havnarfólk skiltu ikki, at allar Føroyar ikki høvdu ráð at byggja eitt parlamentshús, sum í minsta lagið svaraði til kostnaðin av Kommunuskúlanum.

Tinghúsinum er tikin í 1905, meðan ArthurBrend tókmyndina av „nýggja“ Tinghúsinum í 1907.

*Kelda: Birgar Johannessen*




**Dagurin í morgin**

**25. august. Ludvík**, deyður í 1270. Kongur í Fraklandi, nevndur Ludvík hin Heilagi. Stóð á odda fyri fleiri krossferðum. Á einari ferð til Norðurafrika doyði hann av sjúku. Upprunaliga germanskt navn, ið merkir viðgitin og stríð.

†

## Andlát og jarðarferðir

Jarðarferðin hjá **Hans Jørgen Jensen**, Tannlækni í **Hvalvík**, verður úr Hvalvíkar kirkju, leygardagin kl. 14.

**Kjartan Sofus Nielsen** andaðist í heiminum mikumorgunin 23. august, 79 ára gamal. Farið verður úr heiminum í Glyvra kirkju, fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju leygardagin kl 14. Tey, ið ynskja at minnast Kjartan, kunnu lata eina peningagávur til Glyvra kirkju. Konta í peningastovninum.

**Anna Hansen, f. Højgaard**, andaðist týsmorgunin, 65 ára gomul. Farið verður úr heiminum í Glyvra kirkju í dag kl. 18. Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju fríggjadagin kl. 14. Tey ið vilja minnast Onnu kunnu lata eina peningagávu til Glyvra kirkju, konta í peningastovninum.

Kistan við **Óla Jákup Hansen, Leynar**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum í dag 24. august kl. 17. Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju fríggjadagin 25. august 14.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at kæri maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Kjartan Sofus Nielsen**
Saltangará

andaðist í heiminum mikumorgunin 23. august,
79 ára gamal.

Farið verður úr heiminum í Glyvra kirkju,
fríggjadagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju
leygardagin kl. 14.00.

**Nanny, Jón, Edvard og Nicolina**

*Tey, ið ynskja at minnast Kjartan við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til Glyvra kirkju. Konta í peningastovnunum.*

†

## Jarðarferð

Jarðarferðin hjá

**Hans Jørgen Jensen**
tannlækna, Hvalvík

verður úr Hvalvíkar kirkju leygardagin 26. aug.
kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Anna, Anker, Nicolaj, Anna og Njál við familju**